# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Aftur á slóðina?



Samgonguskjalið er stjórnargrundarlagið hjá landsstýrissamgongu. Skjalið er vanliga ein blanding av politiskari kós og ferðaætlan – ein tekstur, sum bæði hevur høg yvirskipað politisk mál og ein hóp av smálutum, ið tykjast løgnir fyri teimum, sum ikki eru kunnug við politiskar prukkhestar. Soleiðis er eisini við tí samgonguskjali, ið varð kunngjørt í gjár. Tá hetta er sagt, so skal samstundis verða viðurkent, at samgonguskjalið hjá endurreistu ABC samgonguni er bæði nýskapandi og nýhugsandi, tó at vit uttan iva kunnu finna fleiri lýti og manglar við tí. Men her er ikki bara vent aftur á slóðina. Tað verður tí sera spennandi, hvørt løgmaður og landsstýrisfólk fara at megna at fremja ætlaninar. Hvørt hetta eydnast velst um nakrar fortreytir, ið snúgva seg um mál, strategi, leiðsluførleikar, samfelagsbúskap og semju. Tað er sjálvsagt ov tíðliga at siga nakað við vissu um allar hesar fortreytir, men vit kunnu líta at málunum og hugleiða, hvørt hesi eru viðkomandi, týdningarmikil og hóskandi at flyta tjóðina frameftir í einum altjóðagjørdum heimi við skjótt vaksandi og sera álvarsomum búskapartrupulleikum. Eisini ber til at hugleiða um møguleikar samgongunar at røkka málunum ella við øðrum orðum: hómast nakrar strategiir í tí skjali, sum var almannakunngjørt í gjár?

Yvirskriftin er altjóðagerð, sjálvbjargni og samhaldsfesti og er raðfylgjan neyvan tilvildarlig. Føroyar skulu sambært egnum mentunarligum, vinnuligum og landafrøðiligum fortreytum gerast partur av altjóða samfelagnum, sum dregur fólk og íløgur til sín. Henda áseting er nýskapandi og áhugaverd, tí hon er ein almenn viðurkenning av, at Føroyar eru vorðnar integreraður partur av altjóðagerðini við øllum tí, sum henda altjóða tilgongd ber við sær av møguleikum og vandum. Her verður nú signalerað ein offensiv strategi, sum skal tryggja, at vit kunnu gagnnýta møguleikarnar, samstundis sum vit brynja okkum móti vandunum. Her er talan um hugburðsbroyting í tøkum tíma. Her krevjast broytingar á snøgt sagt øllum samfelagsøkjum, og tí er ikki nóg mikið við eini styrktari uttanríkistænastu, so tiltrongd ein slík annars kann vera. Vit skulu vita, hvat vit vilja við altjóðagerðini. Hetta krevur, at vit menna útbúgving, gransking og mentan, fremja broytingar í samfelagsbygnaðinum, eggja til og stuðla bygnaðarligum broytingum í vinnulívinum – reka vinnufremjandi politikk. Hetta krevur, at vit grundleggjandi broyta hugburð til Europeiska Samveldið og helst eisini gerast limur í EFTA. Hetta krevur nakrar heilt grundleggjandi og einfaldar politiskar fortreytir so sum arbeiðsfrið og politiskan stabilitet.

Taka vit hetta síðsta first, so er hendan fortreytin høgt raðfest í og við, at tað er eitt kunngjørt mál at skapa stabil viðurskifti í samfelagnum. Ein slík áseting skuldi ikki verið neyðug í einum nútímans fólkaræði, men politiska gongdin seinasta hálva árið hevur avdúkað, at her er talan um avgerandi fortreyt. Við støði í omanfyri lýstu málum og fortreytum ætlar samgongan at reka ein virkisfýsnan, sjálvbjargnis og samhaldsfastan politikk. Hetta ljóðar kanska sum sjálvsagt, men er tað ikki. Hinvegin er ein slíkur politikkur avgerandi og átrokandi neyðugur. Alt ov nógv orka er í føroyskum politikki farin til klandur og persónligar eins væl og flokspolitiskar markeringar. Hetta má halda uppat! CHE samgongan varð ein spennandi roynd og nýbrot, men beklaði ov oftani orsakað av innanflokka ósemjum serliga. Semja og stabilitetur eru tí, nú sett verður út í kortið av nýggjum, ikki eitt mál, men fortreytir, sum fara at seta stór krøv til samgonguleiðara og floksleiðslur. Uttan mun til hvørja politiska áskoðan landsmenn hava, so mugu øll ynskja, at komandi løgmaður fer at hava hepna hond við hesum setningi. Vit ynskja løgmanni og landsstýrisfólkum tilukku, og vit fara at venda aftur til innihaldið í samgonguskjalinum í komandi oddagreinum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.